





MIÐFLOKKURIN

hvørt vikuskifti í Sosialinum

- Menniskjaligur
- Livandi
- Positivur

**Miðflokkurin sjálvandi**



Emly Petersen

# Profilurin

**Navn:** Emly Petersen

**Bústaður:** Klaksvík

**Starv:** Arb. á búðstovni fyri Autistar.

**Familjuviðurskifti:** Gift við John Petersen, og hava tvey børn: Heidi 20 ár og Hemming 17 ár.

**Eg stuðli Miðflokkinum, tí hann:**

- Stendur við sítt orð í týðandi málum, so ein altíð veit, hvat flokkurin vil og er tí eitt virðiligt umboð fyri meg á Løgtingi.
- Hevur víst og vísir, at tey bleytu virðini liggja sera frammalaga.

Í mínum dagliga arbeiði, upplivi eg, hvussu umráðandi ,tað er, at tey, ið bera eitthvørt brek, hava tað gott, og verða væl passaði. At búðstovnar verða gjørdir til teirra tørv, so tey kunnu mennast og trívast her á landi, - og at tey av hjarta eisini kunnu siga: "Hetta landið er eisini mítt". Tað er nakað, ið Miðflokkurin altíð hevur og vil arbeiða fyri, tí hann hevur trúðliga víst umsorgan fyri næstanum.

## Visti tú, at:

- Miðflokkurin, saman við øðrum flokki, hevur heitt á landsstýrið at leggja fyri Løgtingið uppskot um studningslán til bústaðir til fólk, sum vegna skerdan førleikan av ymsum orsøkum, ikki megna at búgva í egnum bústaði, uttan ávísan sosialpedagogiskan stuðul!
- Miðflokkurin í farnu tingsetu, legði uppskot fyri løgtingið at geva teimum tímaløntu sama rætt til; við løn at kunna verða heima hjá sjúkum barni, sum alment lønt hava!
- Miðflokkurin í vár legði uppskot fyri løgtingið, at loyva hjúnum við børnum 16 ár og yngri, hvørt at verða skattaði av helvtini av samlaðu inntøkum teirra upp til kr. 500.000!

www.midflokkurin.fo